Holst tosar við Lyngby

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst tosar nú við Lyngby um at leingja sáttmálan hjá sær við felagið. Host hevur eitt hálvt ár eftir av sínum sáttmála-skeiði, men er sinnaður at halda fram í felagnum, hóast Lyngby nú flytir niður í næstbestu deildina at spæla. Holst hevur skorað 9 má fyri Lyngby í superliguni í ár.

Carrick hevur longt sáttmálan

Manchester United hevur longt sáttmála við miðvallarspælaran Michael Carrick, sum felagið keypti úr Tottenham fyri 150 milliónir krónur fyri tveimum árum síðani. 27 ára gamli Carrick hevur spælt væl í ár, og nú hevur United longt sáttmálan við hann heilt fram til 2012. - Eg rokni við, at hetta United-liðið fer at spæla saman í fleiri ár afturat, sigur Michael Carrick, sum í farna kappingarári spældi 48 dystir fyri United.

KÍ-B36 2-1 (1-0):

KÍ fekk fult fyri fyrstu ferð í átta ár

KÍ

B36

Málverjarnir áttu stóran lut í hendingaríkari uppgerð, har klaksvíkingar eftir tvey mála leiðslu vóru um reppið at missa á stokkinum

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Fyri fyrstu ferð í ár mátti B36 av vøllinum uttan stig. Talan var samstundis um fyrsta tapið í Klaksvík síðani í 2000 hjá árstalsfelagnum

Mynd: Norðlýsið

Fótbóltslagið var gott í Klaksvík í gjár, og orsøkin var eyðsýnd. Við 2-1 sigrinum á B36 lyftu Eyðun Klakstein og hansara menn sær eitt sindur burtur frá niðurflytingarstrikuni, og harafturat er tað ikki á hvørjum degi ella ári, at KÍ vinnur fulla úrtøku á heimavølli ímóti B36.

Meiri neyvt sagt so eru tað knappliga átta ár síðani, at klaksvíkingar - við fyrrverandi B36 venjaranum, Tomislav Sivic, við róðrið – seinast vunnu heimasigur á B36. Tað var 10. september í 2000, og úrslitið ta ferðina var eisini 2-1.

Fyrsti málskjúttin fyri átta árum síðani var Heðin á Lakjuni, sum í 30. minutti legði heimaliðið framum. Fyrsti málskjúttin í gjár var eisini Heðin á Lakjuni. Hesa ferð vóru 20 minuttir farnir, tá ið hann setti hol á: Harley Bertholdsen, sum var drúgvur á høgra vongverja, legði innfyri, og Kristoffur Jakobsen vann frískpark. Heðin sendi flatt úti við stólpan, og Meinhard Joensen noyddist í málið eftir bóltinum, meðan heimafólkið fegnaðist.

Spentar støður frammanfyri málunum eru besta borgan fyri fótbóltsundirhaldi, og hesa ferð vóru nógvar spentar støður frammanfyri málunum: Meinhard blokeraði við beininum, tá ið John Hammer, ið hesa ferð var á miðvøllinum í høgru, og miðvallarin Kristian á Lakjuni royndu seg úr góðum støðum, og Jákup Mikkelsen vísti landsliðsstøði við at parera til horna, tá ið Santos hevði sneitt seg ígjøgnum og royndi ímóti málinum.

Stutt undan steðginum sendi Hanus Thorleifsson bóltin á samankomingina, og í 2. hálvleiki vóru málmøguleikarnir ikki so nógvir og stórir, tá ið B36 legði trýst á, og heimaliðið varð trýst – ivaleyst longri enn teir høvdu ætlað – aftur á vøllin.

- B36 hevði bóltin meiri, men eg haldi ikki, at teir megnaðu at spæla seg til upplagdar møguleikar. Jákup var væl fyri í málinum, og spælararnir vóru uppsettir, konsentreraðir og ofraðu seg, staðfesti væl nøgdi Eyðun Klakstein eftir dystarlok. Hann mintist væl 2-1 sigurin í 2000, tí tá var hann sjálvur millum spælararnar.

- 2-0 málið hjá Rodrigo kom sera væl við hjá okkum. Vit vunnu bóltin, tá ið teir vóru á veg í álop, Kristoffur Jakobsen legði innfyri úr vinstru, og Rodrigo, sum var sera væl upplagdur, stýrdi bóltin í málið, greiðir væl nøgdi KÍ venjarin frá.

Hvussu nú?

- Allar uppgerðirnar eru tættar, og vit sóu ímóti B36, hvussu smáir marginalirnir eru. Eftir at Klæmint Matras hevði minkað um munin við skoti úr brotsteiginum, hevði B36 møguleikar at javna til 2-2, men vit høvdu eisini møguleikar at økja um leiðsluna. Vit skulu fríggjakvøldið til Gøtu, og so eiga vit heimavøll ímóti NSÍ og Skála. Talan er um uppgerðir, har vit kunnu fáa góða úrtøku, men skal tað eydnast, so skulu vit arbeiða nógv og hart, sleppa undan mistøkum og hava marginalirnar við okkum, staðfesti væl nøgdi KÍ venjarin eftir heimasigurin á B36. Tann fyrsti í átta ár!

Tora aftur uttandura

Við málinum til 1-0 var Heðin av Lakjuni ein av stóru hetjunum hjá KÍ, sum fyri fyrstu ferð í átta ár sendi B36 til Havnar við ongum. Onkur vildi kanska vera við, at frísparksmálið var av tí hepnara slagnum, men tað var ein útsøgn, sum Heðin ikki sjálvur vildi skriva undir uppá.

- Milic stillar seg fyri í múrinum, og tá hann flytur seg, smekki eg eftir jørð, og tíbetur fór bólturin inn. Og eg haldi eisini sjálvur, at hatta var væl skotið, segði Heðin í 3. hálvleiki á Rás2 sunnukvøldið.

Sigurin bar við sær, at KÍ eftir eina tunga byrjan hevur vunnið sær átta stig í seinastu fýra dystunum. Og tað er ein úrtøka, sum sambært liðskiparanum hevur gjørt lagið kring felagið munandi betri.

- Tað merkir mann væl. Tað er munur á at vera í Klaksvík nú og so fyri trimum umførum síðani. Tá tordi mann næstan ikki at vísa seg uttandura, men nú er nógv meira positivt. Vit hava jú ikki tapt í fýra dystir, so lagið er vorðið nakað nógv betri.

-mørk

Sagt í 3. hálvleiki

Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum.

»Eg sá ik dystin hja KÍ, men tad sær út at boða frà nýggjum góðum tíðum..!:-) koyr a KÍ«

»Sigfridur C. for inn i skiftirúmið og gav Eb-str-spælarunum (trylledrik), so teir gjørdu eitt flott comeback og skoradu 3 màl...«

»Flott come back eb/streymur. Arnbjørn i heimsklassa«

»Hvussu kann B36 vinna, teirra tikarar róptu nógv. Men heilt erligt, ganga fullir og mala i Klaksvik ein sunnudag, latið okkum fáa alkohol ur okkara fjepparamentan«

»Eru dómarar til keyps á e-bay, veit nakar?«

»Stuttligt var at síggja Sigmund aftur í KÍ blusuni! Hann leikti ein kanón dyst!«

»Útmerka KÍ! Jákup, Ovi og Rodrigo vístu klassa! Formanseffektin heldur fram!«

Tað er gott at eita Christian Høgni í dag. Tà man skorar ímóti nsí:-)«

»Tróndur á landsliðið!«

»Frà EB/STR. Fan hatta var synd ÍF koyrið á.«

»Man Óli Hansen (lidf. hjá NSÍ) enn taka EIN DYST Í SENN? ;-)«